# Jógvan Arge klárt fremstur

*Tað gongur strúkandi at selja føroyskar bøkur verður sagt úr bókahandlunum. Bókahandlarnir kring landið siga, at teir aftur í fjør seldu fleiri bøkur enn árið frammanundan, og enn einaferð var Jógvan Arge tann høvundin, sum var klárt fremstur. Honum í hølunum kom - ikki óvæntað - Álmanakkin*

Sveinur Tróndarson

Jólasølan av føroyskum bókum er tiltikin, og í so máta vóru jólini í 1999 einki undantak.

Eitt ótal av føroyskum bókum kemur út hvørt ár, og heldur ikki har var 1999 nakað undantak.

Felags fyri tær flestu teirra er, at tær koma út stutt undan jólum, og frágreiðingin til tað er sjálvsøgd. Bókasølan í desember er nógva ferðir størri enn hon er í restini av árinum, og tá tað snýr seg um pengar, so er tað skilligt at útgávan er løgd soleiðis til rættis.

Tá talið av bókum er stórt, so er sjálvsagt størri »vandi« fyri, at sølan verður meira smábýtt, men tað er uttan iva nakað, sum høvundarnir og útgevarar teirra takað við.

Kortini eru bøkur, sum søluliga skara framúr, og heldur ikki í so máta var árið 1999 nakað undantak.

### Jógvan Arge og álmanakkarnir

Tann, sum uttan iva hevur gjørt største kvettið av jólasøluni, er Jógvan Arge.

Fjórða bókin í røðini »Teir tóku land« kom út stutt fyri jól, og sum vanligt fór hon beina leið inn á fyrsta plássið á topp tíggju listanum yvir mest seldu bøkur í 1999.

Sjálvur letur Jógvan Arge væl at og tað hevur hann allar orsøkir til. Tað skal tó sigast, at tað munnu vera fáir høvundar, sum gera so nógv við marknaðarføringina av bók síni, sum júst Jógvan, tí hann er nógv úti og signerar bøkur.

Harafturat kemur so tann veruleiki, at evnini Jógvan skrivar um eru evni, sum upptaka fólk, og tað sæst beinanvegin aftur á søluni.

Í hølunum á bókini hjá Jógvani koma báðir álmanakkarnir.

Tann »vanligi« hjá Gamla Bókahandli er tann, sum hevur selt mest, men frágreiðingin til tað er uttan iva, at Skipalistin 2000 kom ikki út fyrr enn um miðjan desember mánaða.

Hetta hevur ávirka jólasøluna skeivan veg, men hóast tað megnaði Skipalistin at sníkja seg upp á triðja plássi.

Uttan at taka nakað frá hesum báðum bókum, so hava vit tó skyldu at leggja afturat, at júst álmanakkar eru kravdir umborð á skipum og størri bátum, og tað hevur stóra ávirkan á søluna.

### Konubrotið Durita

Í fjør stevndi ein seglbátur inn móti Sands bygd fyri fyrstu ferð í fleiri ár.

Skiparin umborð var Durita og við sær í førninginum heim hevði hon eina ferðafrásøgn frá túrinum kring bláu gongustjørnuna.

Einki er at ivast í, at hetta konubrot hevur upplivað ein hóp á vegnum runt knøttin, og tey eru ikki so fá, sum hava hildið tað sama, tí bókin hjá Duritu gjørdist nummar fýra.

Á fimtaplássi finna vit fyrstu skalsøguna á topp tíggju listanum. Tað er bókin hjá Gunnari Hoydal, sum eitur Dalurin fagri, og hon er tann seinasta av bókunum, sum hevur selt fleiri enn 1000 eintøk.

Bókin um Tjaldri seldi, sambært bókahandlunum eisini sera væl, men hon er ikki við í listanum, tí hon er donsk!




*Sjálvt um eingin orðabók kom út í fjør, so var bókasølan betri í 1999 enn hon var í 1998, siga bókahandlarnir. Í fjør gjørdist bókin hjá Jógvani Arge »Teir tóku land 4« tann, sum seldi mest*

**Mynd: Jens Kristian Vang**

### Fólkalív og hetjur

Tað, sum sermerki »hitlistan« er, at tað tykist sera torført hjá yrkingarsøvnunum at finna pláss á listanum.

Einasta yrkingarsavn, sum hevur fingið pláss á topp 10 listanum er Spei spei hjá Tóroddi Poulsen, og tað sníkir seg inn á tíggjunda plássi.

Sama ger seg galdandi við skaldsgøunum, sum hóast tær eru fleiri á listanum, ikki selja serliga nógv.

Kári Árting, sum rekur Bókasøluna í SMS metir, at tað er nokk tí, at vit enn leira eftir hetjum og vísir á bøkurnar hjá Jógvani Arge og Duritu Holm.

– Einki er galið við teirra bókum, minni enn so, men eg haldi tað vera løgið, at ein høvundi, sum Jens Pauli Heinesen seldir so lítið, tí tað er eingin ivi um, at hann dugir framúr væl at skrivað, sigur Kári og leggur afturat, at ein skaldsøga um sjólívið kanska hevði selt væl.

### Jøvn framgongd

Bókahandlar vit hava tosað við kring landið siga annars, sum við einum munni, at tað framvegis er vøkstur í bókasøluni ár undan ári.

Gamli Bókahandil, Bókasølan í SMS og Alfa Bókahandil í Klaksvík siga allir, at teir hava selt væl meir enn teir gjørdu árið frammanundan.

Orsøkin til meirsøluna er, sambært teir tríggjar bókahandlarnar betraðu fíggjarligu umstøðurnar í landinum, við einum farra av størri lestrarhugi millum føroyingar.

Kári Árting sigur, at bókasølurnar hava merkt eina øking í søluni tey seinastu árini .

– Líka síðani vit vóru heilt á botni í kreppuárunum hava vit merkt ein støðugan vøkstur, og tað er sjálvsagt at frøast um, bæði hjá høvundum, útgevarum og handlunum, sigur hann.

## Topp 10 yvir mest seldu bøkurnar í 99

| | | |
|---|---|---|
| 1. | Jógvan Arge | Teir tóku land 4 |
| 2. | H. N. J. Bókahandil | Álmanakkin |
| 3. | E. & M. Olsen | Skipalistin 2000 |
| 4. | Durita Holm | Ferðin um bláu gongustjørnina |
| 5. | Gunnar Hoydal | Dalurin fagri |
| 6. | Maria Vilhelm | Døgverabókin (reyð) |
| 7. | Bergtóra Hanusdóttir | Suðar dýpið reyða |
| 8. | Jens Pauli Heinesen | Ein ódeyðilig sál |
| 9. | Jóanes Nielsen | Underground 2 |
| 10. | Tóroddur Poulsen | Spei spei |

*Afturat hesum bókum hevur eisini Mín Jólabók 1999 selt sera væl, men her er tað at viðmerkja, at hon verður seld skúlabørnum um jóltíðir. Her verða nógvar bøkur seldar, meðan fá eintøk verða seld í bókahandlunum kring landið.*

# PRIX Føroyar ovast

*Tað undrar ikki Høgna Zachariassen, at Prix Føroyar fløgan endaði ovast á topp tíggju listanum yvir mest seldu fløgurnar í fjør, tí tað er tónleikur og tónleikarar, sum tey ungu kenna og tað hevur stóran týdning fyri søluna. Annars er tað framhaldandi útlendski tónleikurin, sum selir væl, sigur hann*

Sveinur Tróndarson

Ikki heilt óvæntað varð tað Prix ´99 fløgan, sum endaði ovast á topp 10 listanum yvir mest seldu føroysku fløgurnar í fjør.




Henda fløgan kom út tíðliga í fjør, og hon hevur sambært Høgna Zachariassen selt væl alla tíðina.

Tí undrar tað heldur ikki hann, at hon endaði ovast á listanum.

– Tað hevur nakað við tað at gera, at tað serliga eru tey ungu, sum keypa ta fløguna, tí tey kenna tónleikararnar og kenna eisini tónleikin, sigur hann.

Hinvegin kann tað kanska undra, at fløgan hjá Kristiani Blak endaði á øðrum plássi, tí tað er - uttan at taka nakað frá Kristiani - ikki tann tónleikur, sum vanliga selir mest herheima.

Ein av orsøkunum til høgu søluna hjá Kristiani er, at fløgan er seld umborð á Norðlýsinum, sum var ein partur av verkætlanini Klæmint, og sjálvur váttar Kristian, at nógvir útlendingar hava keypt fløguna har umborð.

– Men eisini nógvir føroyingar hava keypt fløguna har umborð, sigur Kristian, sum er sera væ´l nøgdur við sítt annaðpláss.

### Kulrøtur og country

Á teimum næstu plássunum finna vit barnafløguna Kularøtur, sum Steintór Rasmussen gav út, og countryfløguna hjá Ragnari í Vík.

Steintór er sum vera mann sera fegin um undirtøkuna fløgan - og bandið - fekk, og so skal havast í huga, at hann eisini var maður aftanfyri fløguna Komið øll við, sum endaði á tíggjunda plássi.

Stuttligt er at síggja at fløgan hjá Ragnar í Vík endaði á fjórða plássi, saman við fløguni hjá Aria, tí tað er fyrstu ferð, at ein »rein« føroysk country fløga er komin á marknaðin.

Høgni Zachariassen fegnast eisini um at tað eydnaðist so væl hjá Ragnari.

– Ein sovorðin fløgan selir antin nógv ella næstan einki, og tí var tað sera gott at síggja, at hon seldi so nógv, sum hon gjørdi, sigur Høgni.

### Mest útlendskt kortini

Hóast tað tí sær rættuliga gott út við søluni av føroyskum fløgum, so er veruleikin, at tað framhaldandi verður selt nógv mest av útlendskum tónleiki. Høgni Zachariassen sigur, at orsøkin til tað er einføld, tí fólk vil hava góðan tónleik, og so kann tað vera líkamikið hvør ið hevur gjørt hann.

– Soleiðis vil tað altíð vera, sigur hann og leggur afturat, at hann er nøgdur við søluna í fjør.

– Ja, vit hava selt fleiri fløgur í 1999 enn í 1998, so vit eiga at vera nøgd við tað, sigur Høgni Zachariassen at enda.

## Topp 10 yvir mest seldu fløgurnar í 99

| | | |
|---|---|---|
| 1. | Ymiskt | Prix Føroyar ´99 |
| 2. | Kristian Blak | Klæmint |
| 3. | Kularøtur | Kularøtur |
| 4. | Ragnar í Vík | The Silence of a falling star |
| 4. | Aria | After these messages |
| 6. | Gummiskuggar | Grísaflísapætur |
| 7. | Eyðun & Terji | Eyðun & Terji |
| 8. | I Am | Cast |
| 9. | Magni Christiansen | Eg hoyrdi einglasong |
| 10. | Komið øll við | Komið øll við |



# Hava havt fyrsta fundin

*Einki er enn komið burturúr samráðingunum millum Føroya Lærarafelag og lønardeildina í Fíggjarmálastýrinum. Patranrnir hittast aftur mánadagin*

Dagfinn Olsen

Mikudagin hittust Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið á fyrsta fundinum, nú samráðingar aftur skulu takast upp um lønar- og starvsviðurskifti hjá læraraum.

### Til 1. mars

Á samráðingunum í fjør fekst bert ein fyribils semja, ið varir til 1. mars..

Tá kom so lang, at Lærarafelagið hótti við at nýta verkfallsrættin, ið yngru lærararnir hava, tí teir eru ikki tænastumenn.

Føroya Lærarafelag vísir til nýggju fólkaskúlalógina. Felagið krevur, at lærarar fáa løn, ið samsvarar við eyka arbeiðsuppgávur í lógini. Eisini metir felagið neyðugt, at lærarar og, ikki minst skúlaleiðslur, fáa tíð til umsiting og ráðlegging.

Felagið hevur roknað út, at nýggja lógin kostar eini 18 milliónir krónur. Hesin peningur er ikki avsettur á fíggjarlógini fyri 2000.

Men bæði Tummas Magnussen, Lønardeildin hjá Fíggjarmálastýrinum og Elsa Birgitta Petersen, Føroya Lærarafelag, eru sera varin við at koma við viðmerkingum um samráðingarnar.

### Kunnandi fundur

Tey siga, at fyrsti fundurin bert var ein kunnandi og tilrættisleggjandi fundur, har part-arnir eisini løgdu fram síni uppskot fyri hvør øðrum. Bæði vísa tey á tíðindaskriv frá Lønardeildini, har tey m.a. siga seg samd um, at samráðingarnar ikki verða førdar í fjølmiðlunum.

### Tíðindaskriv

*Tíðindaskrivið sigur so:*

Kl 10 í dag hittust Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið til fyrstu samráðingarnar um nýggjan sáttmála fyri tann, sum fer úr gildi 1. mars 2000.

Fíggjarmálastýrið og Føroya Lærarafelag gjørdu semju 31. oktober 1999 um at leingja sáttmálan til 1. mars 2000. Samráðingarnar hesa ferð verða sambært hesi semju serliga um arbeiðstíðina hjá lærarum.

Á fundinum vóru ikki realitetssamráðingar, men nýttu partarnir høvi til í felag at leggja komandi samráðingar til rættis. Harumframt gjøgnumgekk Fíggjarmálastýrið sítt útspæl til ein nýggja avtalu um arbeiðstíð.

Partarnir hava avtalað, at meðan samráðingar eru, fara teir ikki út í fjølmiðlarnar við smálutum frá uppleggum ella samráðingarfundum.

Næsti fundur er ásettur at verða mánadagin 10. januar



*Tummas Magnussen avmyndaður uttanfyri Fíggjarmálastýrið undir verkfallinum í vár. Bæði Tummas Magnussen og...*



*...forkvinnan í Føroya Lærarafelag, Elsa Birgitta Petersen, eru sera varin við at koma við viðmerkingum um samráðingarnar millum lærarar og Lønardeildina*

# Vísa til heimasíðuna

*Tøkniliga gongdin ger, at t.d. myndugleikarnir hava ein nýggjan møguleika at kunna um ymiskt viðurskifti. Eisini í Føroyum verður hesin møguleiki nýttur*

Dagfinn Olsen

Tá Sosialurin í gjár fregnaðist eftir tíðindum um samráðingarnar millum Fíggjarmálastýrið og Føroya Lærarafelag, vístu báðir partar til heimasíðuna hjá Lønardeildini hjá Fíggjarmálastýrinum. Har er eitt tíðindaskriv at finna, har øll, ið hava áhuga, hava møguleika at fylgja við gongdini í málinum.

Internetið er nýggjur miðil, ið verður alt meira nýttur.

Undir stóra verkfallinum í vár, tá loftmiðlarnir eisini vóru raktir, var t.d. heimasíðan hjá Starvsmannafelagnum týdningarmesta tíðindatænasta.

Føroysku myndugleikarnir eru væl við og bæði løgting og landstýri hava heimasíður. Heimasíðan hjá Lønardeildini eitur www.lnd.fo




-Góðir brúktir frá
REYNI SERVICE

TOYOTA CAMRY 2,2 GL AUT.
Skrás.:13-07-95
Km.: 76.000
Prísur: 158.600,-
Garanti*
Sýnaður 15-10-98

TOYOTA CARINA 1,6 GL
Skrás.: 01-11-89
Km.: 154.000
Prísur: 49.600,-
Sýnaður 14-10-98

TOYOTA CARINA 2,0 T. DIESEL
Skrás.: 26-03-97
Km.: 98.000
Prísur: 149.600,-
Garanti**

FORD FIESTA 1,8 DIESEL
Skrás.: 30-01-96
Km.: 47.000
Prísur: 79.600,-
Garanti*

TOYOTA CARINA E 1,6 AUT. GEAR
Skrás.: 24-06-92
Km.: 72.000
Prísur: 89.600,-
Garanti*

HONDA CIVIC 1,5 H/B
Skrás.: 01-08-98
Km.: 26.000
Prísur: 119.600,-
Garanti*

TOYOTA CARINA II 2,0 GLi
Skrás.: 22-07-91
Km.: 168.000
Prísur: 65.600,-
Sýnaður 27-03-98

FORD FIESTA 1,3
Skrás.: 16-12-97
Km.: 19.000
Prísur: 79.600,-
Garanti*

TOYOTA COROLLA 1,3 SEDAN
Skrás.: 12-02-96
Km.: 16.000
Prísur: 97.600,-
Garanti*

NISSAN MAXIMA 3,0 AUT. GEAR
Skrás.: 15-12-87
Km.: 135.000
Prísur: 69.600,-
Sýnaður 01-12.99

SERTILBOÐ
KIA CLARUS 1,8 SEDAN
Skrás.: 16.04.98
Km.: 13.000
Prísur: 98.600,- Garanti*
-í besta standi !!

* Brúktir bilar yvir 75.000 kr. verða seldir við BRÚKTBILAVÁTTAN
** TOYOTA bilar hava 3 ára garanti frá fyrstu skrás. dato

REYNI SERVICE
Opið: Mán.-frí. 8.00-17.00




Vegurin Langi -188 Hoyvík - Tel. 313040
Sosialurin - 311820